## Viðmerking:

# Landsbankin og stýringsamboðini



Jørn Astrup Hansen røkir uttan iva áhugamálini hjá tí fíggjarfyritøku, hann er stjóri fyri alt tað, hann kann. Hetta skal hann gera. Men sum meiningsmyndari í búskapartjaki okkara hevur hann stóra ábyrgd, ið átti at rokkið nakað út um dagliga stjórastarv hansara. Tí hevði verið gagnligt um hann í orðadrátti sínum ikki bert bardist fyri smølum vinnuáhugamalum, men at hann eisini hevði vilja til at vísa á samfelagsbúskaparligar loysnir.

**Amboðini**

Astrup Hansen vísir í viðmerkingum í grein tann 19. apríl á, at endamálorðingin fyri landsbankan er *pompøs*, og at landsbankin ikki kann liva upp til hesa. Tí metir hann, at stovnurin er óneyðugur. Uppgávurnar - tó ikki tær pengapolitisku, tí hesar eru sambært Astrup Hansen als ikki til í Føroyum, av tí at tær liggja í Danmark - skulu leggjast til privatu peningastovnarnar.

Endamálið, sum Føroya Løgting hevur felt niður í landsbankalógina, er, at stovnurin skal virka fyri langtíðar og heildarbúskaparligum áhugamálum. Hugsan Astrup Hansen´s um, hvørt hesar endamálsorðingar fyri landsbankan eru góðar ella ikki, er framvegis nakað, hann heldur fyri seg sjálvan.

Í staðin fyri at koma við uppbyggjandi hugskotum um, hvørji amboð landsbankin skal kunna nýta fyri at røkka endamálum sínum, loypir Astrup Hansen á stovnin við at vísa á, at hann er meiningsleysur.

Í eldri grein vísti hann á, at neyðugt er, at ein sentralbanki hevur eina seðlapressu, skal hann kunna virka sum sentralbanki. Landsbankin hevur ikki seðlapressu, ergo er landsbankin ikki sentralbanki og ergo er hann ikki neyðugur.

Í grein seinasta leygardag royndi eg at greiða frá, at seðlapressan ikki er so týðandi amboð í nútímans sentralbankavirksemi, og vísti síðan á dømir um onnur amboð, sum hava verið í nýtslu.

Astrup Hansen vísir eftir hetta á, at talan er um amboð, sum eru farin av móta. Hetta er rætt í samband við flestu av teimum dømunum eg nevndi. Flestu av amboðunum eru tó framvegis tøk at nýta, eitt nú í ECB-høpi, um eitt EU-limaland skuldi fingið álvarsligar trupulleikar í samband við ógvusliga kapitalflýggjan.

**Peningapolitisk tíðarvilla, Astrup Hansen ikki tosar um**

Víðari vísir Astrup Hansen á, at nevndu amboð bert virka, um føroyski kapitalmarknaðurin er vardur mótvegis útlendska kapitalmarknaðinum. Hetta er eisini rætt. Men hvør sigur, at føroyski fíggjarmarknaðurin fult út er innlimaður í fíggjarkervið í Danmark og Evropa? Hvussu kann hetta vera veruleiki í Føroyum, tá ið stovnsligi bygnaðurin er so vónleyst avskeplaður í mun til onnur lond?

Astrup Hansen letst sum um, fíggjaríløgur hjá føroyingum kunnu flóta frítt út og inn úr Føroyum, og umvent fyri útlendingar. Men her er eitt *men*. Astrup Hansen, ið nýtir so nógva orku upp á at rópa hart um broyting av landsbankalógini, tí hendan kemur at trýsta hann í harðari kapping um almennan pening, gloymir at fara í herna móti trupuleika, sum veruliga kunna sigast at vera peningapolitisk tíðarvilla, og sum avlagar fíggjarkervi okkara.

Astrup Hansen, sum hevur so nógv ráð at geva landsstýri og løgtingi um, hvussu peningapolitisk lóggáva skal fremjast og ikki, grettir ikki orð um, hvussu vanligi privati uppspararin í skattalóggávuni við "tekniskum handilsforðingum" verður bundin til bert at brúka føroyskar peningastovnar. Føroysku peningastovnarnir hava framvegis stórar kappingarfyrimunir mótvegis øðrum innlendskum og útlendskum fíggjarstovnum umvegis skattalógina, tí rentuavkast hjá privatpersónum av innlánum í føroyskum peningastovnum verður skattað við 35%, meðan avkast frá øðrum plaseringum verður skattað við marginal-inntøkuskatti. Hevði verið gott, um Astrup Hansen tók hetta evni til viðgerar, næstu ferð hann í miðlunum greiðir frá, hvussu frí og rættvís kapping eigur at fremjast á føroyska fíggjarmarknaðinum.

**Fíggjarkervi í broyting**

Havi roynt at víst á, at sentralbankavirksemi broytist, tí fíggjarkervið broytist; altjóðagerð við útbreiðslu av figgjarkontraktum sum rentu- og valutaswaps, optiónum, futures og partabrøvum eru dømi um hetta. Pengapolitisku myndugleikarnir mugu alla tíðina royna at fylgja við. Hagtalsskipanir skulu tillagast og ítøkiligu amboðini nútíðmansgerast.

Sjálvt máttmiklastu sentralbankarnir í heiminum, FED og ECB, hava trupulleikar við at røkka málsetningum sínum við nýtslu av marknaðartillagaðum amboðunum (sum Astrup Hansen metir vera *the real thing*) í samband við stýring av rentu og pengamongd. Talan er um amboð, sum virka upp á longri sikt og við rættuligari stórari óvissu.

Afturat hesum eru trupulleikar við tí sosiala sundurbýti, sum vanligu nútímans pengapolitiku amboðini viðføra. Tey venda "tunga endan niðureftir".

Tí snýr ein partur av tjakinum í t.d. USA seg um, hvussu framtíðar amboð skulu tilevnast. Fleiri av amboðunum, nevnd hava verið, eru ikki ókend í føroyskum høpi, um enn tey ikki hava verið nýtt so tilvitaði fyri at røkka makrobúskaparmálum.

Tað eigur sjálvandi hvørki at vera undirritaði ella Astrup Hansen, sum avgera, hvørji amboð landsbankin - ella hvør stovnurin so er, ið loysir uppgávur hansara - hevur at røkka málsetningum sínum við. Hetta er vald og uppgáva, sum liggur hjá lóggávumyndugleikanum. Helst er hetta tó so týðandi spurningur, at hann eisini átti at verið tikin upp í stýrisskipanar- ella grundlógartilgongd.

**Fíggjareftirlitið**

Letur til, at Astrup Hansen ikki rættuliga skilir meiningina við fíggjareftirlitinum. Hann vísir á, at landsbankin ikki er undir fíggjareftirlitinum, og at hetta er kappingaravlagandi mótvegis privatu peningastovnunum.

Fíggjareftirlitið er til fyri at verja vanliga uppspararan móti teimum, sum bjóða seg fram alment at umsita pening, t.d. í samband við innlán.

Peningastovnarnir bjóða seg fram til at taka í móti peningi frá almenninginum. Hetta ger landsbankin ikki. Fyri landsbankans viðkomandi er talan er um kundaviðurskifti, sum avmarkaði eru til fíggjarstovnar og partar av almenna sektorinum.

Hervið verið ikki sagt, at landsbankin er — ella skal vera — undantikin eftirliti. Virksemi landsbankans er undir grannskoðanareftirlitið (forvaltningsrevisión), eins væl og lógin um alment innlit, sum ikki fevnir um privatu peningastovnarnar, er galdandi fyri um landsbankan.

At leggja landsbankan undir fíggjareftirlitið gevur líka lítla meining, sum at leggja Fíggjarmálastýrið undir slíkt eftirlit.

**Jonhard Eliasen**

# Veljarakanningin

Nú ein dagin var mær hyggjandi eftir tekst-tv hjá programm 3. Har varð tikið upp eftir Jútlandspostinum, at føroyingar høvdu fingið ein skelk av Nyrup og hansara óhøviska atburði á fundinum tann 17. mars, og tí ikki vildu hava fullveldi.

Tað er løgið, at nakar kann duga so illa at skilja ta veljarakanning, sum nú varð gjørd í Føroyum.

Úrslitið var nevnliga heilt greitt. Tað kanningin vísti var nevniliga, at føroyingar góvu sín stuðul til landsstýrið og tess politikk.

Landsstýrið hevur sagt, at tað ikki vil finna seg í at fáa 4 ára skiftistíð. Tá fólk so verða spurd, um teimum dámar fýra ára skiftistíð, taka tey undir við landsstýrinum og siga nei. Nærri spyrjarin kemur tí, landsstýrið hevur í kvittan, størri verður undirtøkan, og tá spurningurin er, hvørt tey vilja taka undir við tí fullveldisloysn, sum landsstýrið hevur sagt at tað fer eftir, er tað ein stórur meiriluti, sum tekur undir við hesi loysn.

Talan er um eitt ótrúligt lop í fólkahugsanini eftir einum mánaði. Áðrenn Nyrup legði eftir landsstýrinum og eyðmýkti tað framman fyri øllum heimsalmenninginum, vzr meirilutin fyri fullveldi bert eitt prosent. Men nú hevði ein fólkaatkvøða víst at næstan 60 prosent eru fyri og bert gott 40 prosent ímóti.

Men hvussu ber tað so til, tá landsstýrisins politikkur hevur so góða undirtøku hjá Føroya fólki, at landsstýrisflokkarnir koma í minniluta?

Hetta sigur okkum, at tað ikki er tann neyvi samanhangur millum undirtøkuna hjá teimum politisku flokkunum og støðutakanini til fullveldi. Um so var, at tað bert vóru tey, sum tóku undir við landsstýrisflokkunum, sum valdu fullveldi, so hevði hesi loysn verið vátt undir fóti. Orsøkin til at fullveldið nú hevur meiriluta, er tí einfalt hon, at ein stórur partur av veljarunum hjá andstøðuflokkunum taka undir við hesi loysn. Støðutakanin fyri fullveldi er tí eitt tvørpolitiskt mál, og nógv bendir á, at tað sum vit higartil hava sæð í so máta bert er tann smædna byrjanin til eitt heilt nýtt tíðarskeið í føroyskari søgu, tá ið allir flokkar fara at leggja niður ta illstøðu, sum higartil hevur verið um henda spurning og taka



saman hendur til tess at byggja land okkara upp av nýggjum.

Í teimum londum, sum hava vunnið sær frælsi, vísir tað seg nevnliga, at áðrenn avgerðin verður tikin, er nógv ósemja um hvørt tað er rætt ella skeivt at taka eitt slíkt stig. Men tá stigið er tikið, er tað full semja og øll eru errin av tí avriki, sum tey í felag hava gjørt.

Tað sum nú er við at henda í Føroyum er júst hetta sama. Stig fyri stig eru vit komin fram til hesa støðu, og tað ger okkum ikki mun at Jútlandspósturin ikki skilir hvat er um at henda.

**Zakarias Wang**

## Landsstevnan 2000

Í ár verður landsstevnan skipað sum ein mentunarstevna, har vit seta tey menningartarnaðu í fokus. Hetta gera vit við at sýna fram nøkur av teimum avrikum, tey menningartarnaðu arbeiða við til dagligt.

Stevnan byrjar við skrúðgongu frá Bursatanga kl. 10.00, niðan í SMS og oman í Grasagarð har mentunarstevnan verður sett.

Her verður tónleikur, fimleikaframsýning, felagssangur og talur. Tit fáa eisini møguleika at keypa heitt kakao og nýbakaðar bollar.

**Síðani verða framsýningar**

Í Smiðjuni í Lítluvík verður umfatandi málningaframsýning, har umleið 25 menningartarnaði sýna fram. Her verður eisini høvi til at keypa listaverkini.

Á Virkni kunnu vit eisini síggja alt tað arbeiðið, sum gjørt verður á teimum vardu verkstøðunum kring landið. Her sýna verkstøðini fram nakað av teimum lutum, sum tey gera. Eisini her verður møguleiki at keypa nakað av tí, tey hava avrikað. Og sjálvandi verður eisini møguleiki at vitja ta sera áhugaverdu framsýningina um havið. Her fáa tit møguleikan at brúka allar tykkara sansir við at fara ein túr eftir havsins botni.

Umframt framsýningarnar sum halda áfram sunnudagin, verður ein guðstænasta í Havnar kirkju kl. 11.00, sum er rættað móti teim menningartarnaðu og avvarandi teirra.

Sum vanligt verður veitslan leygarkvøldið, og her vilja vit leggja dent á, at vit fáa eina stuttliga og hugnaliga veitslu. Veitslan, sum verður í Badmintonhøllini, byrjar leygarkvøldið kl. 18.00. Her verður borðreitt við góðari súpan, oksasteik, frukt við rákremi, sangi, skemti, horn- og rytmuorkestri og harmonikudansi.

Veitslan kostar kr. 150 fyri vaksin og kr. 100 fyri børn.

Tilmelding á skrivstovuni hjá Javna á tlf. 31 48 27 ella á fax 31 05 57. Seinasta freist at boða frá luttøku er fríggjadagin 28. apríl 2000.

Endalig skrá verður lýst í bløðunum seinni.



# Úr meistarans hondum

*Nýggja altartalvan í Miðvágs Kirkju varð tikin í brúk undir guðstænastuni langafríggjadag*

EDVARD JOENSEN



*Tann velduga altartalvan í Miðvágs Kirkju er eitt meistaraverk* *( Mynd: Edvard Joensen)*

Tann velduga, reyða talvan leggur líkasum hald á alla kirkjuna, fyrsta ein trínur inn. Lýkkan uttan fyri hendan góða vármorgun verður beinanvegin til hita, tá hetta stórverkið opinberast fyri tær.

Tað er nógv fólk á gongd henda langafríggjamorgun. Úr eystri og vestri, úr norði og suðri koma tey. Ung og gomul. Bygdarfólkið og burturfluttir miðvingar, sum komnir eru aftur nú um skírishalguna. Kirkjan fyllist, til at enda eingin stólur er eftir. Fólk ganga upp og niður eftir kirkjugólvinum. Fólk, sum skoða og meta. Tey tosa og halda um. Fólk, sum hava havt sína gongd í kirkjuni og vita, at ein onnur altartalva hevur hingið í bygdarkirkjuni í stívliga hálvtannaðhundrað ár. Ein talva, sum myndar sama evni, sum hendan nýggja. Krossfestingina langafríggjadag fyri knappliga 2.000 árum síðani.

Og so meta tey aftur, hvørt hendan nýggja nú er betri enn tann gamla, tey kendu og høvdu eitt »forhold« til. Soleiðis er, og vil so verða. Men samd tykjast fólk um, at hetta er eitt frálíkt verk, sum tey hava fingið í kirkjuna í dag.

Eg fari, fremmandur, upp á loftið og seti meg mannfólkamegin orglið. Royni at hava útsýni beint á hesa brennandi talvuna og vóni so, at eingin kemur fyri, so eg kann sita í friði og hugsa mær til, hvat eg fái burturúr. Ikki er vist, at tað verður heilt tað sama, sum listamaðurin hevur hugsað.

Men tað kann væl heldur ikki vera meiningin, at øll skulu halda tað sama.

Fáa staðni er friðurin betri enn í kirkjuni at sita í egnum tonkum og filosofera um eitthvørt, tær liggur á hjarta.



Hóast eg royni at syngja við í frálíka sálmasanginum í stúgvandi fullu kirkjuni, leita eygu og hugur alla tíðina til ta beinleiðis orsøkina til, at eg eri her í dag.

Hesin heiti, reyði liturin stendur sum ein skerandi andsøgn til ta einfaldu, kanska beinleiðis keðiligu, kirkjuna annars. Og tað er helst eisini tiltrongt við einum rættiligum »peppi«, fyri at siga sum er.

Hetta er ein ógvuliga stór, reyð talva við einum krossfestum manni á. Oman fyri, fastur í tí stóru talvuni, er ein minni, rundur málningur av einum eingli á bláum himli. Eingilin stendur við útrættum ørmum. Bíðar eftir, at tann krossfesti skal doyggja og rísa uppaftur.

Tann vakra ramman er smurd við 24 karat gulli, fingu vit at vita frá presti.

Okkurt smáting er, sum tú beinan vegin leggur merki til, tá tú skoðar talvuna fyrstu ferð. Krossurin er ikki skaptur, sum krossarnir, vit vanliga síggja. Minnir meira um eitt gott, gamaldags snóratræ, har tvørtræið er lagt niður á ein stólpa, sum settur er niður í vøllin. Men hvat ger tað? Úrslitið av nýtsluni verður tað sama. Maðurin á krossinum doyr. Og fyri tann skuld kann sigast, at ivaleyst hava rómverjar ikki gjørt sær ómak við krossum, tá teir vórðu brúktir í síni tíð. Fornfrøðiligar kanningar siga, at teir negldu ein planka upp á eitthvørt oliventræ ella tað, sum nú var við hondina. Har hekk so hetta ólukkuliga menniskjað og píndist til deyða.

Eitt annað er, at yvirskriftin hjá Pilatusi manglar. So kann ein ivast í, hví tað er?

Men hendan velduga altartalvan er eitt meistaraverk.

Tann reyði liturin er fullkomiliga ráðandi. Og tað er sjálvsagt, haldi eg, meðan eg siti soleiðis burtur í egnum tonkum.

Hetta skal jú ímynda blóðið, hugsi eg og minnist, at tað var blóð Kristusar, sum rann á krossinum fyri at frelsa okkum onnur, sum ikki kláraðu sjálv. So tað var eyðsýnt, at tað blóð, sum rann úr sárunum, tann píndi maðurin á krossinum hevði, var farið um alt løriftið og ímyndaði okkara frelsu.

Men nei. Bíða nú eitt sindur. Helst hevur listamaðurin hugsað sær okkurt annað og meira enn bara blóðið. Reytt ímyndar eisini eld, og ivaleyst er tað skerseldurin, sum frelsarin skal ígjøgnum fyri okkum onnur, sum málarin vil vísa við hesum reyða litinum.

Og tað er so sjálvsagt, tí tann stóri, ásýniligi krossurin og serliga maðurin á honum, standa so klárir framman fyri øllum hesum reyða. Sjálvandi tað, tí hann er jú størri enn alt hetta, sum eldur kann eta upp. Hann vann jú á bæði eldi og vatni.

Og tað leiðir aftur til tað, sum eg so knappliga haldi, at meistarin hevur meint, tá hann litaði alt reytt.

Tann krossfesti doyði. Men tað var ikki endin. Hann reis upp í sólarrenningini páskamorgun.

Sjálvandi! Tað er tann roðandi páskamorgunin, har alt annað varð jarðlagt, og tann myrki krossurin stóð so klárur og sterkur framman fyri tí reyða litinum.

Hetta er í grundini tað, alt snýr seg um, og sum er boðskapurin í allari talvuni. At hóast krossurin ímyndar deyðan, so er deyðin neyðugur fyri at tann størsta hendingin, uppreisinin, kann verða til nakað.

Tað má vera hetta, listamaðurin hevur ætlað, hugsi eg, meðan biskupur fer á prædikustólin at tosa um tað at geva lív sítt fyri onnur. Sum eina serlig áminning um tað, sum hendi langafríggjadag, segði prestur, at í morgun var klokkan í Miðvágs Kirkju klovnað, so nú var neyðugt at fáa eina nýggja.

Og hugurin rennur aftur til frásøgnina um, tá forhangið í templinum skrædnaði, jørðin skalv, og fjøllini klovnaðu.

Langifríggjadagur er.





TRYGDARSKEIÐ

-ið snýr seg um tína trygd á arbeiðsplássinum

*"Ein sera stuttligur háttur at gerast gløggari"*

- **Hvørjir vandar eru við nýtslu av gassum?**
- **Hvørji trygdar- og arbeiðsumhvørvistiltøk eiga at verða framd?**

Føroya Gassøla heldur í viku 19 eina røð av trygdarskeiðum í sambandi við nýtslu av gassi. Hesi skeið verða skipaði av trygdarábyrgdarum frá AGA, ið hava nógvar royndir innan hald av trygdarskeiðum í Danmark, t.d. fyri sløkkilið og Falck, tekniskar skúlar og ídnaðin á øllum stigum. Skeiðini venda sær til øll, ið hava áhuga fyri trygdini hjá virkinum og sær sjálvum. Umframt hetta snýr skeiðið seg eisini um eginleikarnar við gassi og hevur í sær nógvar praktiskar royndir. Tú hevur møguleika at verða við í fylgjandi skeiðum, sum hvør sær varar 3-4 tímar:

| | | |
|---|---|---|
| **Mánadagin** | **8. mai** | **Sørvágur** |
| **Týsdagin** | **9. mai** | **Klaksvík** |
| **Mikudagin** | **10. mai** | **Tórshavn** |
| **Hósdagin** | **11. mai** | **Øravík** |

**Ynskjast fleiri upplýsingar set teg í sambandi við:**

Føroya Gassøla
Akranesgøta 2
FO-100 Tórshavn
Tel. 31 55 44
Fax 31 17 06

Ring og tekna teg ella starvsfólk tíni á tel. 31 55 44 ella 21 25 44.
Seinasta freist at boða frá luttøku er 1. mai.
Kostnaðurin er kr. 195,- fyri fólkið íroknað breyð og kaffi.

AGA SETUR TRYGDINA Í HÁSÆTI

AGA

Sosialurin - 311820